U
N
E
S
C
O

# Yvirlýsingin um fólkabókasøvn



---------------- Givið út hevur ----------------
FØROYA LANDSBÓKASAVN
1995

Frælsi, vælferð og samfelagslig menning, og umstøður, sum stimbra persónligu menningini, eru grundleggjandi menniskjalig virði. Hesi virði eru grundað á, at væl upplýstir borgarar sleppa at brúka teirra demokratisku rættindi og fáa høvi til at spæla ein aktivan leiklut í samfelagnum. Ein konstruktivur hugur at taka lut og demokratisk menning eru treytað av eini nøktandi útbúgving og fríari og óavmarkaðari atgongd til vitan, tankar, mentan og informatión.

Fólkabókasavnið á staðnum er fyrsta stigið á vegnum til vitan, og er tí ein hin mest avgerandi fyritreytin fyri útbúgving fyri lívið, sjálvstøðugari støðutakan og mentunarligu menningini hjá tí einstaka og teimum ymsu bólkunum í samfelagnum.

Í hesi yvirlýsing kunnger UNESCO sítt álit á fólkabókasøvnini sum eina livandi drívmegi til frama fyri útbúgving, mentan og informatión, og sum ein týðandi tátt, tá ið talan er um at virka fyri friði og andaligari menning og vælferð fólksins.

UNESCO heitir tí á landsmyndugleikarnar og myndugleikarnar á staðnum um av fullum huga at stuðla og aktivt virka fyri, at fólkabókasøvn verða stovnað, og at tey fáa góðar virkismøguleikar.

*Myndin á permuni er av Fuglafjarðar Bókasavni*

# Fólkabókasavnið

Fólkabókasavnið er informatiónsmiðdepilin á staðnum, og tað skal veita brúkarunum øll sløg av vitan og informatión.

Fólkabókasavnstænastan byggir á, at øll skulu hava sama rætt til hesa tænastu uttan mun til aldur, rasu, kyn, átrúnað, tjóðskap, mál og sosialan stand. Serskild tænasta og serskilt tilfar verður veitt teimum, sum ikki, uttan mun til hvør grundin er, kunnu brúka vanligu tænastuna og vanliga tilfarið. Her kann talan til dømis vera um málsligar minnilutar, fólk, ið hava eitthvørt brek, ella tey, sum liggja á sjúkrahúsi ella sita í fongsli.

Allir aldursbólkar eiga at kunna fáa tilfar, sum hóskar til teirra tørv. Savnið og tænasturnar eiga at umfata alt egnað fjølmiðlatilfar og nútímans teknologi, umframt tað meira vanliga tilfarið. Stórur dentur eigur at vera lagdur á at hava høgt góðskustøði, og at tænastan og tilfarið hóskar til tørvin har á staðnum. Tilfarið á søvnunum skal lýsa viðurskifti, sum eru uppi í tíðini, og samfelagsgongdina, men skal eisini umfata søguna um menniskjaligu menningina og hugflog menniskjans.

Søvnini og tænastan eiga ikki á nakran hátt at vera undir ideologiskum, politiskum ella átrúnaðarligum sensuri ella handilsligum trýsti.

# Fólkabókasavnið og uppgávur tess

Hesar høvuðsuppgávur, ið hava tilknýti til informatión, lesiførleika, útbúgving og mentan, eigur fólkabókasavnið serliga at røkja:

1. At menna og styrkja lesivanarnar hjá børnum longu á yngri árum.

2. At stuðla bæði sjálvlestri og skipaðari útbúgving á øllum stigum.

3. At skapa møguleikar fyri eini fjølbroyttari persónligari menning.

4. At stimbra hugflogið og skapanargávurnar hjá børnum og ungum.

5. At fremja tilvitanina um mentunararvin, gleðina um listina og kunnleikan um vísindaligu avrikini og gongdina á hesum øki.

6. At gera lætt atkomuligt alt, sum skapt verður í teimum ymsu listagreinunum.

7. At fremja og virka fyri, at sátt og semja kann ráða í sambandinum millum ymiskar mentanir og stuðla tí fjølbroytta mentunarlívinum.

8. At stuðla aldargamla frásagnarkynstrinum.

9. At tryggja borgarunum atgongd til øll sløg av samfelagsupplýsing.



*Ein av høvuðsuppgávunum hjá fólkabókasøvnunum er at menna og styrkja lesivanarnar hjá børnum longu á yngri árum.*

**10.** At vera vinnuvirkjum, feløgum og áhugabólkum á staðnum til hjálpar við eini relevantari upplýsingartænastu.

**11.** At økja um kunnleikan um informatiónstøkni og menningina á telduøkinum.

**12.** At stuðla og vera við í lesifremjandi tiltøkum, sum eru ætlað øllum aldursbólkum, og um neyðugt sjálvt taka stig til slík tiltøk.



*Fólkabókasøvnini skulu stuðla bæði sjálvlestri og skipaðari útbúgving á øllum stigum.*

# Fígging, lóggáva og samskifti

☐ Fólkabókasavnið skal sum høvuðsregla vera leyst av øllum avgjøldum.

Myndugleikarnir á staðnum og landsmyndugleikarnir hava ábyrgdina av fólkabókasavninum. Serlig lóggáva skal vera fyri fólkabókasavnið, sum skal verða fíggjað av landsmyndugleikunum og myndugleikunum á staðnum. Serligur dentur verður lagdur á fólkabókasavnið í teimum langtíðarætlanum, sum lagdar verða fyri mentan, informatiónsveitingar, útbúgving og lesivenjing.

☐ Til tess at tryggja, at bókasavnsarbeiðið verður samskipað, skal í lógunum og langtíðarætlanunum verða arbeitt fram ímóti eini bókasavnsskipan, sum fevnir um alt landið, og sum veitir tænastur á tí góðskustøði, ið nú einaferð er viðtikið.

☐ Fólkabókasavnsskipanin byggir á samskiftið millum landsbókasavn og bókasøvn úti um landið, granskingar- og serbókasøvn, skúlabókasøvn og bókasøvn á lærdum háskúlum og øðrum útbúgvingarstovnum.

# Rakstur og leiðsla

☐ Orðaður verður ein greiður politikkur, sum ásetur mál, raðfesting og tíðarætlan og tænastustøði í mun til tørvin har á staðnum.

Fólkabókasavnið skal skipast, so tað er effektivt, og tað skal rekast sambært framkomnum skipanarhættum.

☐ Samstarv við relevantar samstarvsbólkar, tað veri seg brúkarar og onnur í ymsum yrkisgreinum á staðnum, úti um landið ella í altjóða høpi, eigur at tryggjast.

☐ Tænastan skal standa øllum borgarum í samfelagnum í boði. Til hetta krevst, at bókasøvnini liggja væl fyri, at umstøðurnar at lesa og fást við lesnað eru góðar, at bókasøvini eru tøkniliga væl útgjørd, og at opið er, tá ið tað liggur best fyri hjá brúkarunum. Í hesum liggur eisini, at bókasavnið fer út til teirra, sum ikki sjálv kunnu koma á bókasavnið.

☐ Bókasavnstænastan skal lagast til tørvin á staðnum, uttan mun til um talan er um bygd ella bý.

☐ Bókavørðurin er virkna bindiliðið millum brúkaran og tilfarið. Til tess at tænastan kann verða røkt til fulnar, krevst yrkisútbúgving og eftirútbúgving av bókavørðinum.

☐ Leggjast mugu virkisætlanir fyri virksemið úteftir og brúkarakunning, til tess at gera brúkaran betur føran fyri at brúka alt tilfarið á bókasavninum.

smpr. 1995-299
200000000 96618
Føroya Landsbókasavn
Føroyadeild
10420696




## Fremjan av yvirlýsingini

Teimum, ið taka avgerðir í landinum ella á staðnum, umframt bókasavnsskipanini um allan heim, verður staðiliga álagt at fremja tey aðalmál, sum staðfest eru í hesari yvirlýsing.

---

*Henda yvirlýsing er gjørd í samstarvi við International Federation of Library Associations and Institutions, IFLA. Enska upprunaútgávan: november 1994.*

*Í IFLA-arbeiðsbólkinum, sum hevur endurskoðað fyrstu útgávuna av UNESCO-yvirlýsingini »Public Library Manifesto« frá 1949, hava sitið: Thierry Giappiconi, Frakland, Marie Louise Riesthuis, Holland, Philip Gill, England og Hellen Niegaard, Danmark.*

Erhard Jacobsen týddi.